## Teldur

**PLAYSTATION 2 SPØL**
til sølu. Max Payne 1 (200 kr.), Max Payne 2 og Tomb Raider: Angel of Darkness (á 400 kr.). Ring ella send sms til
*tlf. 580262*

**TELDUR TIL SØLU**
2 HP Vectra 500 MHz teldur til sølu. Tær hava 256 MB Ram, ávíkavist 16 og 38 GB harddisk. Onnur hevur 19" skerm og 64 MB Grafikkort. Hin hevur 17" skerm. Vælegnaðar sum t.d. skúlateldur. 2500 kr. stk.
*Tlf. 421097 aftaná kl. 17*

**PLAYSTATION II SPØL**
Lord of the Rings, the two towers. Aliens versus Predator Extinction. HULK. Ninja Assault. Kr. 300,- stk.
*Tlf. 255212*

**TIL SØLU!**
Skalt tú í skúla og manglar eina farteldu so er ein Vega + 1.8 ght til sølu. Er góð til skúlabrúks o.a. Er áhugi, so ring á
*tlf. 321328/521328*

**FARTELDA TIL SØLU**
Ein Fujitsu Siemens fartelda mobile AMD Athlon 2000 + processara til sølu.
*Tlf. 321328*

**TELDA TIL SØLU**
8 mðr. gomul Dell Inspiron 8600 fartelda til sølu. Hon hevur 1.4 GHz (1 mb cache) 512 mb ram, GeForce grafikkort við 128 mb ram, 30 GB harddisk, 15,4" widescreen skerm. Hon hevur eisini modem, Lan, wlan, ir, firewire, USB.
*Tlf. 222759 eftir kl. 17*

**TIL SØLU**
Playstation 2 við 5 spølum, 1 mánað gamal.
*Tlf. 220405 aftan á kl. 18*

**BÍLIGA TIL SØLU**
Ein Macintosh LC475 og ein PowerMac 6100 bíliga til sølu. Báðar við skermi og ymiskum programmum/spølum.
*Tlf. 315491*

## Tónleikur

**TRUMMUPINNAR TIL SØLU**
Trummupinnar til sølu. Fyri parið bert 50 kr.
*Ring ella sms 772061*

**ER TAÐ NAKAR**
ið eigur eina banjo? Eina írska banjo (4-streingjað). Um so er, keypi eg hana per omgående!!!
*Ring til mín tlf. 509060*

**HÁTALARAR TIL SØLU**
2 stórir hátalarar til sølu vegna plásstrot. Dantax Rockbox 5000 power 250/350.
*Tlf. 503373*

**KAWAI DIGITALT PIANO**
PV30 til sølu fyri 10.000,- ella hægsta boð yvir.
*Tlf. 421240 ella 212240*

**NÆSTAN ÓBRÚKTUR**
100 watt guitarforsterkari frá 77. lab (Gibson/Moog) 2 stk. 12" hátalarar 2 kanalir, innbygdan kompressara, frekvensveljara og ekko, sær út sum nýggjur kr. 5.000,-
*Tlf. 314040*

**KEYBOARD**
Yamaha PSR 9000 til sølu um hóskandi boð fæst.
*Tlf. 212067*

**TIL SØLU**
Klaver heilt bíliga til sølu vegna flyting.
*Tlf. 319912 ella 519912*

## Út- & Sjónvarp

**TIL SØLU**
nýtt Philips bilradio+Panasonic bilradio við cd. Gev eitt boð.
*Tlf. 222195*

**TELEVARPSMÓTTAKARI BÍLIGA TIL SØLU**
til sølu vegna flyting fyri 500 kr. Er 1 ár, men er sum nýggjur.
*Tlf. 519248*

**PARABOL CHANNELMASTER**
180 cm. við superjack 24" motori og motorstýring og sharpsuper høvdi. Stativ hædd 250 cm. jarn galvaniserað, til sølu.
*Tlf. 457352/508086*

**GRUNDIG**
CD-anlegg v/ FM-radio + bandavspælara, er so gott sum nýtt. Bíliga til sølu.
*Tlf. 319020*

**KENWOOD**
bilanlegg til sølu fyri 5.000,- Subwoofer 450 w, forsterkari, 2 hátalarar 280 w, fløguspælari.
*Ring 252894*

**SJÓNVARP**
25'' sjónvarp av merkinum JVC til sølu fyri 6.000 kr. Sjónvarpið er rættiliga nýtt og í toppstandi. Kann eisini brúkast til spøl.
*Tlf. 448097*

**TIL SØLU**
Minidisc v/ radio til bil, ring og gev eitt boð.
*Tlf. 220284*

## Ymiskt

**FERÐASEÐIL TIL SØLU**
Ein Apex ferðaseðil Føroyar-Keypmannahavn ella Billund við Maersk Air til sølu.
*Tlf. 250513*

**KLEKIMASKINA YNSKIST**
Hevur tú eina tú ikki brúkar, vil eg gjarna keypa hana. Kanst tú ringja til mín á
*tlf. 319798/502076*

**EINA VIKU GAMALT**
skateboard til sølu. Nývirði 700,- kr. til sølu fyri 550,- kr.
*Tlf. 283941*

**JETHRO TULL**
Hevur nakar eitt ella fleiri atgongumerki til Jethro Tull konsertina 11. august í Norðurlandahúsinum til sølu?
*Ringi tlf 251450 ella 319567*

**BREYÐSKERARAR**
Teir gomlu góðu Rådvad breyðskerararnir eru at fáa fyri 250 kr. stk.
*Tlf. 373169/373313*

**JETHRO TULL KONSERT**
Eitt atgongumerki til konsertina tann 11. august til sølu fyri kr. 375,-
*Tlf. 228033*

**FØROYSKIR BROTFLÍSAR**
uml. 35 fermetrar til sølu.
*Tlf. 214141*

**TRØ OG PLANTUR TIL SØLU**
Nøkur Selje-røn, Fuchsiaer og steinplantur til sølu.
*Tlf. 448271*

**TIL SØLU**
5 ymiskar std. av elovnum til sølu. Samlað ella hvør sær.
*Tlf. 317261/597261*

**VIÐ 12. MANNI TIL DUBLIN**
2 pláss vid 12. manni til Dublins við MB tours 10.–14. oktober fáast við at gjalda depositum á tilsamans 2000 kr.
*solva1980@hotmail.com ella tel. 504187*

**MÁLNINGUR TIL SØLU**
Málningur frá 1984 av Eivindi Mohr til sølu til hægstbjóðandi. Stødd 81x65 við rammu. Digital mynd kann mailast. Ringið
*tlf. 314129/216622*

**VINDEYGA TIL SØLU**
Óbrúkt vindeyga, 140x145, úr Sipo-mahogny, til sølu fyri 3.000 kr. Nývirði 5.200 kr.
*Tlf. 314129 / 216622*

**MÁLNINGUR TIL SØLU**
Málningur frá 1976 av Eivindi Mohr til sølu til hægstbjóðandi. Stødd 56x45 við rammu. Digital mynd kann mailast. Ringið
*Tlf. 314129 / 216622*

**FORVITNISLIG VITJAN**
Chief Sonne Reyna, Yagi-indiani fortelur um indianska mentan og lívsáskoðan. Um hetta hevur tín áhuga,
*ring 312090*

**NIKON COOLPIX 3500**
Lítið brúkt kamera, 3,2M pixel við ladara, 64MB Compact Flash og nýtt battarí. Í sera góðum standi, virkar perfekt. 2300 kr.
*Tlf. 314587*

**OMEGA LUMMAUR**
Orginalt Omega Grand Prix 1900 ur, við leður lumma. Silvur við gull legering. stødd Ø 52mm H 15,5mm. Kassa nr 6177038, urverk nr 5395096. Perfekt til føroyska búnan. 2600 kr.
*Tlf. 314587*

**SANDOYGGIN**
Sandoy, Eldhús-rabatmerkini frá 60-unum og 70-unum verða eftirlýst. Onnur líknandi merkir hava eisini áhuga.
*Tlf. 321291 ella 521291*






# Fiskidagar/ veiðiorka / tilmæli etc.

**Meinhard Jacobsen**



Nú er so aftur tíð at gera niðurstøðu um, hvussu nógvir fiskidagar skulu tilmælast fyri at fiska komandi ár.

Politisk semja tykist fyri at skerja fiskidagatalið við 1,5%. Tað er sjálvandi gott, at semja fæst, men spurningurin um, hví nakrir vilja skerja og aðrir halda dagatalið ella økja tykist eins ósvaraður og áður.

Eitt miðalveiðiár kring Føroyar er 100.000 tons við núverandi veiðudøgum. Vit skerja dagarnar við 1,5% og um forholdini eru proportional, so skuldi veiðan fyrsta árið eftir verið 98.500 tons svarandi til eina minking við 1.500 tons.

Fyrsti spurningur kundi verið »Klárar fiskimálastyrið at stýra so neyvt, sum talan er um her??«

Næsti spurningur kundi verið "»Vita vit nokk um fiskiskapin kring Føroyar til at byrja at tjakast í so smáum pørtum«

Størsti fiskiskapur kring Føroyar er veiðan eftir svartkjafti. Upplýst er at í 2003 vóru fiska ca. 550.000 tons av svartkjafti í Føroyskum øki.

Fiskiskapurin eftir svartkjafti er øktur sera nógv tey seinastu árini og eru bátarnir nógv effektivari í dag enn bert fyri fáum árum síðan. Togkraftin og trolstøddin er fleirfalda og gera góð tól tað soleiðis, at trolið kann styrast allastaðni í sjónum bæði tætt at botni, inn ímóti kantunum og uppígjøgnum sjógvin.

Einki innara mark er fyri, hvar hesir bátar kunnu fiska. Eftir upplýsing frá fiskiveiðieftirlitinum kunna teir trola allastaðni uttan í stongdum kassum.

Vita vit, hvussu nógv hjáveiða er í svartkjaftaveiðuni??

Er upplýsingarskylda um hjáveiðu hjá svartkjaftaskipunum galdandi??

Eftir upplýsing frá fiskiveiðieftirlitinum er einki mark galdandi fyri, hvussu nógv føroysk-, norsk-, íslensk-, og EU skip kunnu hava í hjáveiðu men mark á 10% er fyri russisk skip.

Hvussu kann støðan verða ??

- Svartkjafta veiða 550.000 Tons
- Hjáveiða hjá svartkjaftinum 10% 55.000 Tons
- Samlað botnfiskaveiða 100.000 Tons
- Maksimum óregistrera veiða fyri at fiskifrøðingarnir hava skeivt grundarlag fyri metingunum 5.000 Tons
- Frávik í % av svartkjaftaveiðuni fyri at fiskifrøðingarnir fara skeivir 0,9 %
- Skerjing av botnfiskaveiðuni í % av svartkjaftaveiðuni 0,27 %

Um veruleikin er sum omanfyri nevnt ella bert í nánd av hesum, so kann spurningur reisast, um allur tann harði orðadráttur um fiskidaga tilmæli hevur nakað endamál. Spurningur kann eisini setast við fiskifrøðisligu ráðgevingina um hon kann nýtast til nakað sum helst. Um hjáveiðan svarar til 0,9% so verður grundarlagið fyri metingunum hjá fiskifrøðingunum skeivt.

Loyvd hjáveiða á 55.000 tons er helst 50.000 tons ella 10 ferðir so stór sum frávikini mugu verða í tølunum fyri at fiskifrøðingarnir kunnu meta rætt.

Tankavekjandi er, at 1500 tons av botnfiski svara til 0,27% í hjáveiðu hjá svartkjaftinum.

Aftur at hesum kann roknast við, at hjáveiðan er sum oftast relativt stórur fiskur »De store spiser de smá«.

Logiskt kann hugsast, at tey ár, tá gróðurin er vánaligur inni á landgrunninum, fer tann fiskur, ið er førur fyri tí, út í svartkjaftin at sveima og kemur aftur tá ið gróðurin er betur. Møguliga er hetta »the missing link« millum fiskirannsóknarstovuna og fiskimennirnar um, at fiskurin rýmur fyri síðan at koma aftur. Við núverandi svartkaftafiskiskapi kann vera at fiskurin rýmur fyri síðan at verða fiskaður sum hjáveiða.

Vanligt føroyskt vildi nú verði at sagt, at teir bert vilja leita eftir onkrum at skylda uppá. Fiskifrøðingar hava longu verið frammi og sagt, at partrolarnir eru teir, ið hava skylduna fyri, at upsin er smáur. Tað kann gott vera, men í hesum viðfangi er ikki spurningurin um geva nøkrum skylduna fyri nakað. Vit mugu finna útav, hvussu tilfeingið kring Føroyar er sett sama, og hvussu vit best kunnu gagnnýta hetta? Skilgóð stýring krevur góða upplýsing.

Tað er sera undrunarvert, at fakligi stoltleikin hjá fiskifrøðingunum ikki fær teir til at seta alt inn uppá at finna út av, hvussu svartkjafta fiskiskapurin er samansettur.

Sáttmálasamráðingar um svartkjaftin skulu vera í Føroyum í september, og um støðan er sum omanfyrinevnt, so mugu og skulu vit krevja nógv størri rætt enn vit hava gjørt. Tað vil verða ein vanlukka ikki at krevja tað, sum av røttum er okkara.

Lat okkum fyri einaferð skyld gera okkara heimaarbeiði til lítar og fáa greiðu á hesum og ongantíð ov skjótt!!!!

# Fonn Flog flytir í nýggj og størri høli

**Ferðaskrivstovan Fonn Flog í Klaksvík hevur almenna móttøku í nýggju hølunum fríggjadagin**

FERÐASKRIVSTOVA
*Tíðindaskriv*

Í meiri enn 12 ár hevur Fonn Flog verið ein virkin ferðaskrivstova við alsmant vaksandi virksemi.

Hesi árini hevur Fonn Flog hildið til í hugnaligum og góðum hølum á Nólsoyar Páls Gøtu 28, sum nú eru vorðin ov smá við tí menning, ið verið hevur.

Í fyritøkuni starvast í dag 6 fólk.

Ongantíð hevur verið meiri neyðugt enn nú, at kundin fær eina dygga tænastu, tá ið hann skal út í heim at ferðast, samstundis sum kundar úr øðrum londum kenna seg væl í okkara lítla landi.

Í samband við at hølini nú eru vorðin ov smá, og fyritøkan nú hevur brúk fyri einum rúmligari karmi við øktum starvsfólkatali og kundarnir eru vorðnir talsterkari, flytir Fonn Flog í nýggj og størri høli í Biskupsstøðgøtu 10.

Í hesum sambandi hevur Fonn Flog almenna móttøku fríggjadagin 13. august frá kl. 16-19, har øll eru vælkomin.



## HEILSANIR



**Góði Filip**
Stóribeiggi, nú ert tú ein stórur so stórur drongur. Lukku og gleði á tínum 10-ára degi tann 10. august
**Heilsan Levi og Jóhannes**



**Góði elskaði babba**
Hjartaliga tillukku á 32 ára degnum. Vit elska teg
**Ynskja Rúna Maria og mamma**



**Allarbesta Lea**
Eg ynski tær hjartaliga tillukku við 2 ára degnum
**Ari**



**Góði Aksel**
Hjartaliga tillukku við 21 ára føðingardegnum 12. august. Her droymir tú sikkurt nakað gott!!!! Eg elski teg.
**Heilsan tín elskaða Kristina**



**Góði elskaði sonur og beiggi**
Hjartaliga tillukku við 25 ára føðingardegnum og próvnum. Eisini ein heilsan til Annu Mariu við føðingardegnum.
**Heilsan mamma, babba, Sigrun og Magnus**



**Gunvør Reyberg**
Her er tú ung & grøn. Men nú er tú bara GRØN:-)
Hjartaliga tillukku við 22 ára degnum.
**Ynskja KL770 og NA462**



**Góði elskaði Janus!!**
Hjartaliga tillukku við tínum fyrsta føðingardegi. Jesupápi signi framtíð tína.
**Ynskja mamma og babba**



Salsa - Spanien - Nerja - 30° - sólkrem - bikini - hyggens og eg gleði meg



Hjartaliga takka vit øllum sum við gávum og fjarritum, og á annan hátt gleddu okkum á hjúnabandsdegi okkara 3. juli 2004. Ein serlig tøkk til tykkum sum hjálptu til.
**Joan og Gunnfríður Dahl-Olsen og dreingirnir**

**Heilsanir** — 30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:.................................................................
..........................................................................
..........................................................................
..........................................................................
..........................................................................
..........................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ..................................................................
Bústaður: ............................................................
Bygd/býur: ................................... Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«